

*Savnsmynd*

# Ponyríðing og kappríðing á Vestanstevnu

**Leygardagin 16 og sunnudagin 17 juli verður ponyríðng á Tormansbakka. Leygarkvøldið verður stuttleikakappríðing á sandinum.**

Á Vestanstevnu verða nógv barnavinarliga tiltøk og á Tormansbakka verður m.a ponyríðing, har børnini kunnu sita á hestabaki og ríða ein túr. Eisini verður høvið til at keypa sær onkran vælhóskandi kóboyhatt og okkurt annað skemtiligt. Leygarkvøldið, tá ið friðurin hevur lagt seg eftir kappróðurin, verður kappríðing á sandinum og byrja verður uml. kl.19.00.

Hetta setur ein serligan dám yvir stevnuna og vónandi verður undirtøkan stór.

Tað er Vága Ríðingarfelag sum skipar fyri hesum tiltøkunum.

# Útisjónleikur

**Stórur útisjónleikur verður leiktur gjøgnum Miðvágs bygd sunnudagin 17 juli.**

Sunnudagin á Vestanstevnu verður stórur útileikur leiktur gjøgnum Miðvágs bygd. Byrja verður kl.15.00 á vágni og lagt verður at landi úti við bátahylin. Leiðin gongur framvið Jansagerði, síðan longur heim í bygdina, yvir á tað sum tey kallað "Pallin" og Pálsgróthús. Hesin partur av leikinum kemur at snúgva seg um tí navnframu illu Beintu og prestin Peder Arrheboe.

Á brúnni við politistøðina verður leikurin Bukkubrúsar leiktur, áðrenn leiðin gongur oman til Beitishúsini, heimið hjá Mikkjal á Ryggi. Við Beitishúsini verður ymiskt sum hevur tilknýtið til Mikkjal á Ryggi tikið fram.

Frá Beitishúsunum verður fólkið leitt oman í Kirkjar og til viðalundina. Í viðalundini verða bæði kongshjún, riddarir og prinsur, og verður her verður eisini tað stóra slagið um prinsessuna.

Frá viðalundini verður farið oman á fótbóltsplenuna at royna at sparka "steinfótbólt", men fáa leikararnir góða hjálp uttanífrá.

Leikurin endar við onkrum sera spennandi niðri á sandinum.

Nógv fólk úr allari oynni verða við í leikinum, men eisini koma fólk aðrastaðni úr landinum at spæla við. Tað er Marjun í Kálvalíð, sum saman við øðrum góðum sjónleikarum stendur fyri uppsetan av leikinum.

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

*Tann stóra føroyska buffetin á Vestanstevnu*

*- royn føroyskan mat og mentan*
*fríggjakvøldið, leygardagin frá kl. 12.00 ella sunnudagin frá kl. 12.00*

**Vit bjóða eina føroyska buffet við meira enn 30 ymiskum heitum og køldum fiska- og kjøtrættum.**

**Chefkokkurin bjóðar m.a.:**

**Kalt**
*Turt lambstjógv*
*Turt tvøst*
*Saltað spik*
*Turran fisk*
*Seyðarhøvd*
*Saltað lambstjógv*
*Øður*
*Ymiskir fiska- og skeljadjóraserrættir*

**Heitt**
*Grindagrýta*
*Lambaryggur*
*Oksaháryggur*
*Dunnubringa*
*Reyðtunga*
*Kalvi*
*Laksur*
*Kongafiskur*
*Saltfiskur*

**Omaná**
*Surprise*



*fyri hvønn* **180,-**



**Føroyskur dansur:**
*Leygarkvøldið uml. kl. 20.30 verður skipað fyri føroyskum dansi.*
*Eisini verður greitt frá um føroyska mentan.*

team85

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA · SØRVÁGUR · TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo

